# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Eysturríki kemur 11. oktober

**Hóast tað gekk striltið, so eydnaðist londunum í bólki sjey at gera av, hvussu spælast skal í komandi HM-undankappingini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Frakland, Rumenia, Serbia, Litava, Eysturríki og Føroyar koma á fundi í Wien leygardagin ásamt um kappingarskránna fyri teirra bólk í undankappingini fram móti heimsmeistaraskapinum í Suðurafrika í 2010.

Av teimum tíggju dystunum, sum eru á skránni hjá Føroyum, verða fýra spældir komandi heyst. Fyrsti dysturin er á útivølli móti Serbia, áðrenn Føroyar fýra dagar seinni taka ímóti Rumena.

Longu tá lutur varð kastaður, tosaðu tey flestu um, nær dysturin móti Eysturríki mundi standa fyri framman. Og nú er so greitt, at hesin verður tann 11. September. Seinasti dysturin í 2008 verður á útivølli móti Litava.

Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, segði eftir fundin í Wien, at hann var hampuliga væl nøgdur. Ikki minst tí tað eydnaðist føroyingum at sleppa undan at spæla landsdystir í mars ella november. Hartil høvdu føroyingar eitt kraftigt ynski um, at onkur av heimadystunum skuldi spælast í juni mánaði, og tað gekk eisini at enda.



*Fronsku heimsstjørnurnar hava ikki gloymt Føroyaferðina. Somikið stórur var skelkurin, at Frakland ikki vildi til Føroya longu í 2008*

### Frakland ræddist

Umboð fyri franska fótbóltslandsliðið noktaðu fyri at koma aftur til Føroya longu næsta ár, og tí verða komandi HM-dystirnir ímóti Fraklandi spældir í 2009

Um vikuskiftið samráddust londini í HM-undankappingarbólki 7 í Wien. Føroyar eru eitt av londunum í bólkinum, og tað er Frakland eisini. Í heyst var franska landsliðið í Føroyum og hevði eina lítið hugaliga ferð við nógvari seinking og harðligari lending.

Á fundinum í Wien um vikuskiftið gjørdu fraklendingar greitt, at teir vildu ikki aftur til Føroya longu næsta ár, og tí verður heimadysturin ímóti Fraklandi ikki spældur fyrr enn í august 2009, og so er at vóna, at fraklendingar hava gloymt seinastu ferðina til Føroya.

## FAKTA

**Dystarskráin hjá føroyska liðnum sær soleiðis út:**

6. september 2008: Serbia – Føroyar
10. september 2008: Føroyar – Rumenia
11. oktober 2008: Føroyar – Eysturríki
15. oktober 2008: Litava – Føroyar
10. juni 2009: Føroyar – Serbia
19. august 2009: Føroyar – Frakland
5. september 2009: Eysturríki – Føroyar
9. september 2009: Føroyar – Litava
10. oktober 2009: Frakland – Føroyar
14. oktober 2009: Rumenia – Føroyar

# Helt endan vera komnan

**Franski landsliðsvenjarin í fótbólti var ógvuliga skakkur av lendingini í Føroyum í heyst, segði hann við føroysku fótbóltsumboðini á fundi í Wien um vikuskiftið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fundurin í Wien var millum fótbóltssambondini í okkara HM-undankappingarbólki, og millum londini í bólkinum eru júst Føroyar og Frakland.

Tá ið fraklendingar í heyst spældu EM-dyst í Føroyum, høvdu teir eina ferð, sum teir seint fara at gloyma. Teir vóru nógv seinkaðir, og tá ið teir komu niður at, var lendingin sera hørð.

Fronsku stjørnurnar søgdu einki um hetta, meðan teir vóru í Føroyaum. Teir hildu maskuna, fóru beinleiðis til Havnar, hølvaðu Føroyar av, og fóru so aftur av landinum.

Á fundinum í Wien um vikuskiftið greiddi Raymond Domenech, landsliðsvenjari, frá ferðini til Føroya, og hann segði føroysku umboðunum, at tað stóð einki til umborð á flogfarinum, og hann helt sjálvur, at hansara seinasta løta var komin.

Hetta greiddi Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, frá morgunsendingini hjá Útvarpinum í morgun.



*Raymond Domenech ivaðist ikki í, at hansara seinasta løta var komin, tá flogfarið skuldi seta seg í Vágum í oktober mánaði í ár*

